Brúkaraváttanin

Treytin fyri at fáa atgongd til Búskaparskipan landsins er, at brúkarin veit um og góðtekur nøkur minstukrøv fyri KT trygd. Fyri at nýta Búskaparskipan landsins skalt tú tí góðtaka hesar treytir.

Eg havi fingið kunning um og góðtaki:

At eg haldi loyniorðið loyniligt fyri øllum øðrum.

At eg ikki skrivi loyniorðið niður.

Er illgruni um, at onnur vita loyniorðið, so broyti eg tað uttan drál.

At eg læsi telduna ella útriti meg, tá ið eg fari frá telduni.

At eg skrivi loyniorðið, hvørja ferð tá ið eg innriti meg, tí tað ikki er loyvt at gera sjálvvirkandi innritan við t.d. at leggja loyniorðið í eitt forrit (‘makro’).

At eg ikki skráseti viðkvæmar persónsupplýsingar í skipanunum hjá Gjaldstovuni (smb. lóg um viðgerð av persónsupplýsingum).

At eg veit, at persónsdátur og aðrar trúnaðardátur skulu verða handfarnar við størsta umhugsni.

At veit eg um skeivleikar ella trygdarbrot í Búskaparskipan landsins ella havi illgruna um tað, so dráli eg ikki og boða Gjaldstovuni frá.

At eg havi fingið at vita, at brúk av skipanini verður skrásett við atliti til KT trygd og við atliti til meiri málrættaða tænastu, t.d. undirvísing.

At eg kenni KT trygdarpolitikk og leiðreglur, sum galda fyri mín stovn.

Tað er t.d.
- krøv um viðgerð av trúnaðarupplýsingum
- at eg ikki leggi inn forrit o.t., sum leiðsla stovnsins ikki hevur góðkent
- hvørji krøv stovnurin setur til mobil arbeiðspláss
- at antivirusritbúnaður er dagførdur, her verður serliga dentur lagdur á farteldur.

Tú góðtók brúkaraváttanina tann __.__.20__